# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Altjóðagerð, sjálvbjargni og samhaldsfesti

Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin samdust tíðliga í morgun um at skipa nýggja ABC-samgongu, og at nýggja samgonguskjalið, sum hevur fingið yvirskriftina »Altjóðagerð, sjálvbjargni og samhaldsfesti« verður lagt fram á tíðindafundi helst í morgin. Tað má ásannast, at hendan yvirskriftin, skjaldramerkið hjá ABC-samgonguni, er bæði áhugaverd og aktuell og fevnir um trý sera viðkomandi og mest átrokandi øki í føroyskum politikki og almennum lívi. Hartil nema hesi trý hugtøk kjarnuøki í politikkinum hjá teimum trimum flokkunum, ið nú hava myndað samgongu. Sambandsflokkurin hevur burturav verið tann flokkur, sum hevur verið ídnastur at mæla til nærri samstarv við og nærri tilknýti til ES. Fólkaflokkurin hevur eftir formansskiftið tilvitandi lagt seg á eina nógv meira radikala sjálvstýriskós, og Javnaðarflokkurin hevur sum kunnugt tað samhaldsfasta samfelagið sum mál og innihald.

Hví meta vit, at yvirskipaðu málini hjá nýggju samgonguni eru áhugaverd, aktuel og viðkomandi? Taka vit yvirskriftina í raðfylgju, so má ásannast, at Føroyar ikki eru nóg brynjaðar til altjóðagerðina. Hetta hava vit ferð eftir ferð víst á í hesum teigi. Hóast ES er okkara størsti handilspartur hava vit bert eina avoldaða fríhandilsavtalu við hetta samveldi. Hóast flestu framkomnu lond eru knýtt at útbúgvingar-granskingar og mentanarsamstarvinum hjá ES hava vit enn ikki fingið formligt samstarv. Tíðin er nú búgvin at fáa í lag eitt nærri formaliserað samstarv við ES, sum kann tryggja okkum eins góðar sømdir, sum tey lond, ið vit kappast við, Ísland og Noreg hava.

Tað er ikki heilt greitt, hvat samgongan leggur í sjálvbjargnishugtakið, men hetta merkir helst, at nakrar yvirtøkur skulu fremjast, og at hetta ikki verður ein so ógvuslig tilgongd, sum ætlanin hjá CHE samgonguni. Heldur skulu vit vænta eina stig fyri stig tilgongd, sum Fólkaflokkurin hevur siðvenju fyri, tá búskaparligu og fíggjarligu útlitini ikki eru tey bestu. Her man samgongan vera á linju við dastið av landsmonnum, tí yvirtøkuhugurin sveiggjar vanliga eftir búskaparligu konjunkturunum.

Sum búskaparligu útlitini eru, so er harðliga brúk fyri at styrkja samhaldsfestið í samfelagnum. Fyrr ella seinni fara vit at merkja avleiðingarnar av altjóða fíggjar- og búskaparkreppuni, og tá ræður um at hava sosiala trygdarnetið í lagi. Samhaldsfestið er ein moralskt bindandi yvirskrift, sum fer at vera nakað av eini avbjóðing hjá tí, sum fær hetta mál at umsita. Royndirnar hava higartil víst, at tað er sera torført at sameina mál og innihald á hesum øki, tá almennu inntøkurnar minka, men júst tí er tað bæði gott og jaligt, at hugtakið er vorið eitt mál í sjálvum sær. CHE verður nú avloyst av ABC. Nú fáa vit so at síggja, hvussu henda nýggja gamla konstellatiónin fer at roynast.

**Sosialurin**

## Sætti hvør rýmir av landinum

SÍMUN PAULI JACOBSEN



»Sætti hvør rýmir av landinum«, boðar Sosialurin frá í vikuskiftisblaðnum 12.-14. september 2008.

Einstakir persónar eins og heilar familjur flyta við jøvnum millumbili til Danmarkar ella annað land, eins og familjur eins og einstakir persónar stundum flyta heim aftur til land okkara. Hetta er ikki nakað nýtt. Soleiðis hevur verið til allar tíðir. Men nú eru tekin um, at mong - ógvuliga mong - ikki unskja at koma heim aftur til land okkara at búgva.

Sættaparturin av føroyingum í Danmark ynskja ikki at koma heim aftur til land okkara at búgva. Hetta er sera álvarsamt.

Men er hetta sera, sera álvarsamt, hvussu mikið meira álvarsamt er tað ikki fyri land okkara, at sættaparturin av øllum føroyingum her á landi eftir fáum vikum flytur til Danmarkar ella annað land? Og var tað ikki júst hetta, sum hendi undir kreppuni í nítiárunum?

Fer ein sættapartur av íbúgvum landsins at flyta av landinum, hvørja ferð ein kreppa tekur seg upp her á landi, so verður tómligt fyri fólk her á klettunum.

Hvussu nógvar sættapartar av landsins íbúgvum tolir land okkara at missa, um fleiri djúpar kreppur taka seg upp?

Ikki eru meira enn seks sættapartar at taka av.

Mær tykir, at støðan í stórum parti av heiminum í dag meira og meira minnir um eina sera djúpa búskapar- og fíggjarkreppu. Risastórir peningastovnar í fleiri og fleiri londum fara av knóranum.

Hvat man so orsøkin vera til, at so mong fluttu av landinum undir djúpu kreppuni í nítiárunum?

Jú, orsøkirnar kunnu vera so nógvar, millum annað:

Niðurskrivingin av húsavirðinum við umleið eini helvt.

Høga arbeiðsloysi, sum kom upp um 20%.

Eykaskatturin upp á 8,5% av arbeiðslønini.

Fleirfalding av rentuskattinum.

Fíggjarognargjaldið av uppsparda peningi fólksins í peningastovnunum.

Afturútsigldar sosialar skipanir eins og tænastur í mun til grannalondini.

Tíðindi vilja vera við, at meira enn 300 milliónir kr. resta í, at komandi fíggjarlóg javnvigar. Hetta er nærum sama upphædd, sum blokkurin varð minkaður árliga frá 1. januar 2002.

Hví mugu føroyskir fullveldismenn ræðast danskan pening? Danskan pening, sum føroyinigar hava notið so ómetaliga gott av gjøgnum langar tíðir.

Tað var danskur peningur, sum hjálpti føroyingum at fáa stovnsett fólkapensiónina og aðrar sosialar veitingar.

Tað var danskur peningur, sm saman við Marshallpeningi og sera bíligum donskum statsláni yvir 30 ár hjálpti føroyingum at fáa gongd á SEV útbyggingina.

Tað var danskur peningur, sum við Realkreditstovni og fiskaríbanka hjálpti føroyingum at fáa endurnýggjað fiskiskipaflotan í fimtiárunum.

Tað var danskur peningur, sum við 60 milliónagrunninum útvegaði føroyingum kapital, so samferðslukervið kundi útbyggjast við tunlum, vegum og autostradum.

Tað var danskur peningur, sum við heildarveitingini hevur hjálpt føroyingum at útbyggja hetta landið.

Er tað skomm at fáa fíggjarliga hjálp frá øðrum landi, meðan landið verður útbygt?

Ísrael er ein sjálvstøðug tjóð. Men hóast tað fáa teir árliga eitt ótal av milliardum úr USA. Einki land klárar seg einsamalt í dag. Hugsa um øll tey londini, sum fáa studning úr ES til dømis.

Men aftur til fíggjarlógina. Hvussu ætla landsstýri og løgting at fíggja eitt hall upp á meira enn 300 milliónir kr.?

Munnu teir ætla at senda rokningina til fólkið við møguligari rentuskattahækking og fíggjarognaravgjaldi, sum undir seinastu kreppu? Tora teir tað? Eftir at fullveldismenn søgdu nei takk til 366 milliónir kr. árliga frá 1. januar 2002. Tora teir tað, so er vandi fyri, at enn ein sættapartur av fólkinum flytur av landinum við milum kapitalupphæddum.

Send lepan til:

Sosialurin
Boks 76
FO-110 Tórshavn



Kostnaður: 495,-
um ársfjórðingin

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent ópostað. Sosialurin rindar postgjaldið

64

Navn: ______

Bústaður: ______

Bygd / býur: ______

Telefon: ______

Undirskrift: ______

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.